ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

Tað hevur sjálvandi eisini givið sjálvsálit, at vit tey bæði seinnu árini hava spælt okkum víðari
(Klæmint Matras, B36)

Hafsteinn vann fyrsta teinin

Ikki heilt óvæntað var tað íslendski Hafsteinn Ægir Geirsson, ið vann fyrsta teinin í ársins Statoil Kring Føroyar

Vinnarin av kappingini frá í fjør, Hafsteinn Ægir Geirsson, spardi ikki nakra orku, og vann fyrsta teinin við 17 sekundum frammanfyri Torkil Veyhe

Mynd: tsf.fo

SÚKKLING
Pætur Albinus
patur@sosialurin.fo

Undan súkklukappingini Statoil Kring Føroyar varð íslendski Hafsteinn Ægir Geirsson mettur sum favorittir, og heitið livdi hann fult upp til, tá ið hann vann fyrsta teinin. Teinurin var ein 8 kilometrar langur einkultstartur, sum varð koyrdur í Klaksvík.

16 súkklarar stillaðu til byrjan um 18-tíðina, og umstøðurnar at súkklavóru ikki av teimum bestu. Sera kalt var, og fitt av vindi var eisini úti við Ánirnar. Súkklararnir kundu tó fegnast um, at vegurin var góður og turrur at koyra á.

Torkil vísti tenn

Púra sum væntað streyk Hafsteinn Ægir Geirsson avstað við sigrinum, og sleppur hann tískil at koyra í bláu føraratroyggjuni á næsta teininum.

Men tað var ikki fullkomiliga uttan kapping, at sterki, 26 ára gamli íslendarin kundi stilla seg ovast á sigurspallin. 17 ára gamli føroyingurin, Torkil Veyhe, var ikki langt frá at geva Hafsteinni ein hvøkk, tí hann endaði 17 sekund aftanfyri Hafsteinn.

Á hesum einkultstartinum vórðu súkklararnir sendir út á teinin við einum minutti millumbili, og tískil var ikki trupult at fáa eina meting um, hvussu landið lá. Torkil varð sendur næstseinastur út á teinin, meðan Hafsteinn varð sendur seinastur. Tað stóð klárt beinanvegin, at Hafsteinn vann, tí við strúkandi ferð kom hann á mál, minni enn ein minutt eftir Torkil.

Tað var eisini Hafsteinn, ið helt hægstu miðalferðina. 43,11 km/t var miðalferð hansara, og hetta var umleið ein kilometur hægri enn tann, sum Torkil helt.

Vónbrótandi avrik

Skal verandi meistarin, Hafsteinn Ægir Geirsson, hava álvarsmótstøðu, má hetta helst verða frá Gunnari Dahl-Olsen. Men tað gekk ikki heilt eftir vild hjá Gunnari, sum mátti taka til takkar við einum fjórða plássi.

- Eg haldi takk gekk OK í dag. Tað var tætt millum nummar 2, 3 og 4, men Hafsteinn vísti bara, at hann var í serflokki, segði Gunnar eftir teinin.

Gunnar er eftir hondini vorðin 42 ára gamal, og aldurin byrjar møguliga at spæla inn.

- Møguliga er hetta mítt síðsta Statoil Kring Føroyar. Nú eri eg blivin 42 ár, men eg haldi, at tað handlar um at tíma at súkkla. Og tað tími eg framvegis, sigur hann avgjørdur.

Spurdur, um tað tað ikki er hansara skylda at vinna á Torkil Veyhe longur, svarar hann.

- Bæði og, einaferð má tað jú venda. Nú havi eg havt tað nokso lætt í fleiri ár, so tað er gott at hava okkurt at kappast við, sigur Gunanr Dahl-Olsen, sum framvegis hevur sín fyrsta Statoil Kring Føroyar-sigur til góðar.

Ymsar umstøður

Íslendsku súkklararnir hava ment seg nógv bara síðan í fjør, og eisini hava íslendingarnir ein ungan harra, ið kann gera um seg í oddinum. Hann eitur Davíð Þór Sigurðsson, og er bert 18 ára gamal. Í gjár gjørdist hann nummar 3.

- Íslendararnir venja sera hart. Teir hava ein venjara, ið veruliga koyrir á teir, sigur Gunnar um menningina hjá íslendingunum, sum trúðfastir venda aftur til føroysku kappingina á hvørjum ári.

Nógvir av føroysku súkklarunum eru nýliga vendir heimaftur eftir oyggjaleikirnir á Rodos, sum vegna nógva hitan gjørdist sera hart hjá súkklarum okkara.

- Eg trúgvi ikki tað er ein vansi fyri okkum. Míni bein føldist væl, men vit fáa betur at síggja í morgin, tá ið vit hava verið um Eiðisskarð, sigur Gunnar flennandi.

Í morgin verður teinurin 105 kilometrar, og hann verður koyrdur í Eysturoynni. Byrjað verður kl.15 á Oyri, og súkklararnir væntast at vera á mál við Statoil-støðina í Runavík umleið kl.19.30.

Úrslit, 1. teinur:

1. Hafsteinn Ægir Geirsson, Hjólreiðafélagi Reykjavíkur, 00:11:08
2. Torkil Veyhe, Tórshavnar Súkklufelag, 00:11:25
3. Davíð Þór Sigurðsson, Hjólreiðafélagi Reykjavíkur, 00:11:43
4. Gunnar Dahl-Olsen, Tórshavnar Súkklufelag, 00:11:47
5. Áslakkur Nesá, Føroya Triathlonfelag, 00:12:12
6. Niels Jakob Thomsen, CC Gladsaxe, 00:12:13
7. Eli J. Christiansen, Tórshavnar Súkklufelag, 00:12:17
8. Sigmund Olsson, Tórshavnar Súkklufelag, 00:12:32
9. Sigurgeir Agnarsson, Hjólamenn, 00:12:38
10. Hlöðver Sigurðsson, Hjólreiðafélagi Reykjavíkur, 00:12:44
11. Hlynur Þorsteinsson, Hjólreiðafélagi Reykjavíkur, 00:12:48
12. André Tolstoj, CC Gladsaxe, Hjólamenn 00:13:00
13. Niels Bay Petersen, CC Gladsaxe, 00:13:05
14. Mikki Bangtrup, Ringkøbing cycle klub, 00:14:09
15. Súsanna Skylv Sørensen, Føroya Triathlonfelag, 00:14:46
16. Janus Povlsen, CC Gladsaxe, 00:15:27

Ovi aftur til Klaksvíkar

Eftir hálvt ár í B36 fer Ovi Nysted nú aftur til barndómsfelagið

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

B36 og KÍ skrivaðu í gjár undir avtalu, sum ber við sær, at Ovi Nysted nú aftur fer at spæla við KÍ.

Sterki verjuspælarin, sum eisini kann nýtast í álopinum, skifti undan hesum kappingarárinum til B36. Har hevur hann tó ikki verið fastur millum teir fyrstu ellivu, og nú flytur hann so aftur til Klaksvíkar at spæla.

Ovi Nysted er 27 ára gamal, og fram til byrjan av hesum kappingarárinum hevur hann fyri tað mesta spælt við KÍ. Undantakið var eitt skifti í fjør, tá hann spældi við LÍF.

Sáttmálin, sum Ovi og KÍ hava gjørt, røkkur fram til endan av 2008 skrivar KÍ-heimasíðan.

Gull og silvur í lopi

Silja Højgaard og Elinborg Durhuus gjørdu veruliga bart, tá einstaklingakappingin hjá kvinnum var á skránni á fimleika-oyggjaleikum í gjár.

Tað eydnaðist nevnliga Silju at vinna gull í kappingini, meðan Elinborg vann silvur við sínum besta lopi.

Talan hevur higartil verið um kappingar eftir tillagaðu FIG-reglunum. Fríggjadagin verður talan um einstaklingakapping eftir altjóða FIG-reglunum, og so verður spennandi at vita, hvørt føroysku úrslitini verða eins góð tann dagin eisini.

-mørk

Heidi og Heidi til B36

Kvinnuliðið hjá B36 hevur leitað sær styrk, nú tær tær fara undir seinnu hálvu av kappingarárinum. Heidi Sevdal og Heidi á Lakjuni hava higartil spælt við NSÍ, men sambært Dimmalætting fara tær báðar nú at spæla við B36.

Heidi Sevdal verður av fleiri mett sum ein tann besti framrættaði spælarin í kvinnudeildini. Heidi á Lakjuni hevur eisini ofta gjørt nógv um seg í álopinum, men hetta árið hevur hon tó verið málverji hjá NSÍ.

-mørk

Javnt móti Aberdeen

Førloyska U17-kvinnulandsliðið spældi í gjár 2-2 javnleik móti Aberdeen, sum er vertur fyri Football Festival í hesum døgum. Føroyska liðið var aftan fyri bæði 1-0, áðrenn Mona Breckmann og Gunn Hentze skoraðu fyri Føroyar.

Eftir steðgin eydnaðist tó vertunum at skora til endaliga úrslitið.

-mørk